**KUNNINGARSKRIV: GRANSKINGARVERKÆTLAN VIÐVÍKJANDI VIÐFØDDUM MANGLANDI LUKTISANSI (ANOSMI)**

Tað er sjáldsamt við viðføddum manglandi luktisansi. Í sekstiárunum var ein grikki, nevndur C. S. Lygonis, kommulækni í Føroyum m.a. á Sandoynni og í Suðuroynni. Í eini vísindaligari grein frá 1969 lýsir hann nakrar familjur, har fleiri fólk høvdu manglandi luktisans, sum varð staðfest á ungum aldri og har sterk ábending var um at talan var um ættarbregði. Í vísindaligum høpi veit man ikki nógv um ílegu/genetisku orsøkina til hetta fyribrigdi, ið á fakmáli verður nevnt anosmi.

Í nakrar mánaðir er ein forkanning gjørd av anosmi í Føroyum og í komandi mánað verður so farið undir eina genetiska granskingarverkætlan innan hetta fyribrigdi. Kliniskur ábyrgdarhavi og kontaktpersónur í føroyska heilsuverkinum er: Bjarki Ellefsen, yvirlækni á Oyrna-nasa-háls deildini á Landssjúkrahúsinum. Bjarki Djurhuus, lækni er hjálpari.

Granskingarleiðari í verkætlanini er Helena Gásdal Sørensen, cand. scient. í biomedicini. Harumframt eru í granskingarbólkinum: Niels Tommerup, professari við Københavns Universitet, umframt granskarar frá Radboud University, Nijmegen Medical Centre, í Niðurlondum.

Verkætlanin er góðkend av Vísindasiðsemisnevndini. Verkætlanin verður framd í samstarvi við Ílegusavnið, sum er ein samskipandi stovnur innan føroyska heilsuverkið, ið byggir upp ættarbandsskrá, diagnosuskrá og vevnaðarskrá, og viðgerð umsóknir um at granska í ílegum hjá føroyingum.

Persónar, ið meta seg hava viðføddan manglandi luktisans eru sera vælkomnir at seta seg í samband við Oyrna-nasa-háls deildina á Landssjúkrahúsinum.

Hvør luttakari skal lukta til 12 ymisk aroma, umframt at gjørd verður ein grundleggjandi næsa-kanning og lítil blóð- ella spýttroynd verður tikin. Herfrá verður DNA isolerað og nýtt til víðari kanningar. Um gjørligt er best, um foreldur, systkin og børn hjá persónum við anosmi eisini lata blóð- ella spýttroynd, men er hetta ikki ein avgerandi treyt.

Luttøkan er í øllum førum ókravd og sjálvboðin. Tað ber til seinni at hálsa um og taka seg burtur úr kanningini. Lýsingar av úrslitum koma bert fram sum samlað úrslit og ikki sum einstakir persónar.

Fólk, ið meta seg hava viðføddan manglandi luktisans kunnu seta seg í samband við Bjarka Ellefsen, yvirlækna á tlf. 30 45 00 lokal 5361 ella ringja/sms'a 59 10 25 ella senda teldupost til biobank@ls.fo

**Granskingarbólkurin & Ílegusavnið – 17. februar 2009**